# SERSTØK BYGGISAMTYKT
# FYRI KARLAMAGNUSARBREYT

Við heimild í 4, stk. 1, í løgtingslóg nr. 13 frá 21. mai 1954 um býarskipanir og byggisamtyktir, verður ásett:

## ØKIÐ SAMTYKTARINNAR

**§ 1.** Økið, ið serstaka byggisamtyktin er galdandi fyri, er avmarkað, sum sýnt er á viðfestu fylgjuskjølum og er partur av matr. nr. 138, Hoyvík, ið umfatar byggifeltini 1 til 47 við Karlamagnusarbreyt.

*Stk. 1.* Stødd av byggifeltum og felagsøkjum og mest loyvda hædd á bygningum, sum er sýnt á viðfestu fylgjuskjølum, kann verða regulerað í sambandi við matrikulering.

## FRÁGREIÐING UM ØKIÐ

**§ 2.** Blandað miðstaða- og bústaðaendamál

*Stk. 2.* Ætlanin við hesi serstøku byggisamtykt er at skipa bygging, parkering v.m. fram við Karlamagnusarbreyt, ið er ætlað at verða ein framtíðar miðstaðargøta í Hoyvíkshaganum.

*Stk. 3.* Alt økið liggur í A3 øki í 3. grundumráði í Almennu byggisamtyktini fyri Tórshavnar kommunu, ið er lagt til blandaða bústaða- og miðstaðabygging, har loyvt er at hava handlar, smáhandverk og minni virki, skrivstovur, stovnar, samkomuhús, heilsubótarhøli og tílíkt, ið samsvarar við umhvørvisflokk 1 og 2 fyri vinnustykki í Tórshavnar kommunu.

*Stk. 4.* Partur av veghædd skal, á byggifeltunum millum Hoyvíkar kirkju og Atlagøtu, verða til útatvenda nýtslu (handil, matstovu o.t.), ið almenningurin hevur atgongd til.

*Stk. 5.* Sambært grein 4 í ásetingunum fyri A3 øki í Almennu byggisamtyktini fyri Tórshavnar kommunu er í eini heildarætlan ella í serætlan fyri náttúrliga avmarkað økið loyvt at víkja frá vanligu ásetingunum fyri A3 økið og fyriskipað, at húsini verða sett í veglinju ella byggilinju. Henda serstaka byggisamtykt er ein tílík serætlan fyri eitt avmarkað øki.

## NÝTSLA ØKISINS

**§ 3.** Økið skal nýtast til virki og stovnar, ið eru flokkað í umhvørvisflokk 1 og 2, har tað verður mett ráðiligt av býráðnum. Harafturat kann økið nýtast til búðstaðir.

*Stk. 2.* Funktiónirnar, ið økið er kannað til, eru t.d. skúlar, stovnar, skrivstovur, tænastuvirki sum t.d handlar, mat- og skeinkistøð v.m. og búðstaðir.

*Stk. 3.* Skrivstovur og tænastuvirki kunnu m.a. verða:

1. -Smásøluhandlar, matstovur, hotel, smærri hondverksvirksemi og smærri verkstøð
2. -Í sambandi við skrivstovur kann eisini verða lættari framleiðsluvirksemi.
3. -Almennir stovnar sum skúlar, barnagarðar og sambýli av ymiskum slag.
4. Frítíðarvirksemi, so sum høli til ítróttarvirksemi, áhugafeløg o.a.

*Stk. 4.* Tá byggiloyvi skal gevast innan økið hjá hesi serstøku byggisamtykt, skal byggivaldið meta um, hvørt nýtslan og tær funktiónir, ið nevndar eru í hesi grein, eru býttar á hóskandi hátt í økinum. Fyri at tryggja eitt hóskandi býti, kann byggivaldið tí seta sum treyt fyri byggiloyvinum, at ávís nýtsla ella funktión eftir ítøkiligari meting skal verða, ella at ávís nýtsla ella funktión ikki kann verða.

## BYGGING, STØDD, STAÐSETING OG SNIÐ HÚSANNA

**§ 4.** Tað kann bert byggjast innan fyri byggifeltini, og skal øll bygging byrja við markinum ímóti Karlamagnusarbreyt.

*Stk. 2.* Mest loyvda bygging er ásett fyri hvørt byggifelt sær í viðfestum kortskjølum.

*Stk. 3.* Hús mugu ikki vera bygd hægri enn ásett er í kortskjølum fyri hvørt einstakt byggifelt.

*Stk. 4.* Kjallarahædd kann í ávísum økjum byggjast í samráð við byggivaldið.

*Stk. 5.* Kjallarahæddin, ið er heilt undir veghædd (Karlamagnusarbreyt), verður ikki tald við í nettonýtslustignum.

*Stk. 6.* Ein partur av veghædd, á byggifeltunum millum Hoyvíkar kirkju og Atlagøtu skal verða til útatvenda nýtslu (handil, matstovur o.t.). Hesin parturin er endin í niðastu hædd ímóti Karlamagnusarbreyt og 6 m inn í bygningin. Sí viðhefta kortskjal nr. 4.1, ið vísir prinsippskurð.

*Stk. 7.* Ovasta hæddin í bygningum, sum eru 3 hæddir ella hægri, skal verða nýtt til bústað.

*Stk. 8.* Byggingin skal haldast innan fyri ásettu treyturnar í hvørjum einstøkum byggifelti. Sí treytir í viðfestu kortskjølum fyri hvørt byggifeltið.

## ÚTSJÓND HÚSANNA

**§ 5.** Øll bygging í økinum, sum serstaka byggisamtyktin fevnir um, skal gerast í samráð við byggifultrúan.

*Stk. 2.* Kommunan skilar sær rætt til at seta krøv til útsjónd av bygningum í sambandi við út- og umbygging ella nýbygging.

**BYGGIMYNDUGLEIKI OG ÁTALURÆTTUR**

**§ 6.** Byggimyndugleiki og átalurættur eru sambært hesi byggisamtykt hjá Tórshavnar býráð einsamøllum.

**UNDANTAKSLOYVI FRÁ BYGGISAMTYKTINI OG BROYTINGAR**

**§ 7.** Smávegis lættar frá reglunum í hesi byggisamtykt kann byggivaldið geva loyvi til, um so er, at dámur á økinum, sum byggisamtyktin roynir at skapa ella varðveita, ikki verður broyttur av teirri orsøk.

*Stk. 2.* Broytingar í byggisamtyktini kunnu verða gjørdar eftir samtykt býráðsins og góðkenning landsstýrisins eftir reglum um samtykt og góðkenning av nýggjum byggisamtyktum.

Heilsu- og innlendismálaráðið

| [redacted] | |
|---|---|
| Mál nr.: | 15/00733 |
| Ætlanarskriv: | 22. okt. 2015 |
| Góðkent: | 26. okt. 2015 |
| Váttað: | M Poulsen |



| HEILSU- OG INNLENDISMÁLARÁÐIÐ | Blandað bústaðar- og miðstaðarbygging |
|---|---|
| Mál nr.: | 17/00124 |
| Ætlanarskriv: | – |
| Góðkent: | 1/5 - 2017 |
| Váttað: | [signature] |

# SERSTØK BYGGISAMTYKT:

# Karlamagnusarbreyt

**Góðkend 16.11.06**

**Seinast broytt: apríl 2017**




**Tórshavnar Kommuna**
Byggi- og býarskipanardeildin

| | |
|---|---|
| **Heiti:** | KMB. Støddir og hæddir á bygifeltum |
| **Viðmerking:** | Øki 1. |
| **Skjal nummar:** 1. | **Journal nr:** 16/00598 |
| **Dagur:** | **Mát:** 1:500 í A3 — **Tekna:** MKJ |
| **Rættað:** | 26.01.2016 |







| | | | |
|---|---|---|---|
| **Tórshavnar Kommuna**<br>Byggi- og býarskipanardeildin | | | |
| **Heiti:** KMB. Støddir og hæddir á bygifeltum | | | |
| **Viðmerking:** Øki 2. | | | |
| **Skjal nummar:** 2. | | **Journal nr:** 16/00598 | |
| **Dagur:** | | **Mát:** 1:500 í A3 | **Tekna:** MKJ |
| **Rættað:** 26.01.2016 | | | |




**Tórshavnar Kommuna**
Byggi- og býarskipanardeildin

| | |
|---|---|
| **Heiti:** | KMB. Støddir og hæddir á bygifeltum |
| **Viðmerking:** | Øki 3. |
| **Skjal nummar:** 3. | **Journal nr:** 16/00598 |
| **Dagur:** | **Mát:** 1:500 í A3 — **Tekna:** MKJ |
| **Rættað:** | 26.01.2016 |




**Tórshavnar Kommuna**
Byggi- og býarskipanardeildin

| | | | |
|---|---|---|---|
| **Heiti:** KMB. Støddir og hæddir á bygifeltum | | | |
| **Viðmerking:** Øki 4. | | | |
| **Skjal nummar:** 4a. | | **Journal nr:** 16/00598 | |
| **Dagur:** | **Mát:** 1:500 í A3 | **Tekna:** MKJ | |
| **Rættað:** 26.01.2016 | | | |




| | |
|---|---|
| **Tórshavnar Kommuna** Byggi- og býarskipanardeildin | |
| **Heiti:** KMB. Støddir og hæddir á bygifeltum | |
| **Viðmerking:** Øki 4. | |
| **Skjal nummar:** 4b. | **Journal nr:** 16/00598 |
| **Dagur:** | **Mát:** 1:500 í A3 · **Tekna:** MKJ |
| **Rættað:** 26.01.2016 | |




**Tórshavnar Kommuna**
Byggi- og býarskipanardeildin

| | | | |
|---|---|---|---|
| **Heiti:** | KMB. Støddir og hæddir á bygifeltum | | |
| **Viðmerking:** | Øki 5. | | |
| **Skjal nummar:** | 5. | **Journal nr:** | 16/00598 |
| **Dagur:** | **Mát:** 1:500 í A3 | **Tekna:** | MKJ |
| **Rættað:** | 26.01.2016 | | |




**Tórshavnar Kommuna**
Byggi- og býarskipanardeildin

| | | | |
|---|---|---|---|
| **Heiti:** | KMB. Støddir og hæddir á bygifeltum | | |
| **Viðmerking:** | Øki 6. | | |
| **Skjal nummar:** | 6. | **Journal nr:** | 16/00598 |
| **Dagur:** | **Mát:** 1:500 í A3 | **Tekna:** | MKJ |
| **Rættað:** | 26.01.2016 | | |

HEILSU- OG INNLENDISMÁLARÁÐIÐ

Tórshavnar kommuna
Postsmoga 32
110 Tórshavn

1. mai 2017
**Mál**: 17/00124-7
**Tygara Skriv**:
**Viðgjørt**: KHP

*Góðkenningarskriv*

**Broyting í serstøku byggisamtyktini fyri Karlamagnusarbreyt**

Eftir reglunum í løgtingslóg nr. 13 frá 21. mai 1954 um býarskipanir og byggisamtyktir hevur Tórshavnar kommuna í skrivi, dagfest 1. februar 2017, sent Heilsu- og innlendismálaráðnum uppskot til broyting í serstøku byggisamtyktini fyri Karlamagnusarbreyt til góðkenningar.

Ætlanin er at broyta hæddaravmarkingina á øllum stykkjunum oman fyri stykki 29, sum ásett á viðheftu kortskjølunum. Ætlaða broytingin ávirkar ikki útsýni o.a. fyri onnur stykkir.

Uppskot til broyting í serstøku byggisamtyktini fyri Karlamagnusarbreyt hevur ligið alment frammi frá 16. desember 2016 til og við 6. januar 2017. Tá freistin at koma við møguligum broytingaruppskoti ella mótmæli var farin, 27. januar 2017, hevði kommunan einki mótmæli ella broytingaruppskot móttikið.

Býarskipanarnevndin hevur havt málið til ummælis og hevur í ummæli sínum, dagfest 21. mars 2017, mælt til, at broytingin verður góðkend uttan viðmerkingar.

Heilsu- og innlendismálaráðið tekur undir við ummælinum frá Býarskipanarnevndini.

Sagt verður frá, at Heilsu- og innlendismálaráðið við heimild í § 4 í býarskipanarlógini góðkennir broytingina í serstøku byggisamtyktini fyri Karlamagnusarbreyt sum omanfyri nevnt.

Hjálagt rættað kortskjøl við átekning frá Heilsu- og innlendismálaráðnum

Vegna Heilsu- og innlendismálaráðið

Hilmar Høgenni
deildarstjóri

Eirargarður 2 • FO-100 Tórshavn
Tel: +298 304050 • Fax: +298 304025 • E-mail: himr@himr.fo